# HH Hægri Handilsskúli

HH er ein 2 ára handilsgymnasial útbúgving. Fyri at verða tikin upp á HH skalt tú hava lokið FHS-støðisárið, har tú í minsta lagi hevur havt støddfrøði á C-stigi ella eitt 2. fremmandamál (t.d. týskt) á C-stigi. Skúlin metir eisini, um umsøkjarin er skikkaður at ganga í HH.

Undirvísingin í HH gevur tær eitt breitt innlit í samfelags- og vinnulívsviðurskifti, samstundis sum útbúgvingin er almennandi. Tú fært sostatt førleikar, sum bæði kunnu brúkast, um tú ætlar tær at fáa starv ella lærupláss í privatari ella almennari vinnu, ella tú ætlar tær undir hægri framhaldslestur.

**Hvat kann eg brúka HH til?**

- Lesa víðari á Handilsháskúla, journalistháskúla, universiteti, lærara- og pedagogskúla v.m.
- Fara í læru í peningastovni, handli ella á skrivstovu
- Fara í arbeiði

**Lærugreinir**

Í 1. HH eru tær kravdu lærugreinirnar 945 tímar um árið, vallærugreinirnar eru millum 140 og 175 tímar.

Í 2. HH er møguleiki at velja fleiri vallærugreinir, har eru tær kravdu lærugreinirnar 525 tímar, meðan vallærugreinirnar eru millum 490 og 630 tímar. Tú skalt velja í minsta lagi tvær vallærugreinir á A-stigi, í minsta lagi onnur skal vera ein vinnubúskaparlig vallærugrein. Tær vinnubúskaparligu lærugreinirnar eru: Sølubúskapur og Virkisbúskapur.

**Kravdar lærugreinir**

Altjóða búskapur B, Danskt A, Enskt B, Føroyskt A, KT B, Samtíðarsøga B, Sølubúskapur B, Vinnulívsrættur C, Virkisbúskapur B

**Vallærugreinir**

2. fremmandamál C/B, 2. fremmandamál A, Ársroknskapur A, Enskt A, Innovation C, Marknaðarsamskifti C, Mentanarfatan C, Sálarfrøði C, Støddfrøði C/B/A, Sølubúskapur A, Virkisbúskapur A,